NSÍ er komið aftur á landsliðskortið

Bara ein av heilt gomlu garduni var á vøllinum, tá Føroyar fyri triðja ferð vunnu undankappingardyst á útivølli

Vit hava fleiri ferðir verið inni á, at eitt ættarliðsskifti á landsliðnum hevur hómast í havsbrúnni. Í 2–0 sigrinum á Luksemburg leygardagin var tað sjón fyri søgn, at fyrsta ættarliðið av spælarum, sum umboðaðu Føroyar í altjóða skrásettum landsdystum, er um at hvørva, og at tað ber til at standa seg, sjálvt um fleiri úr næsta ættarliðnum ikki eru tøkir.

Kurt Mørkøre var einasti maður, sum var á vøllinum leygardagin, og sum eisini var á vøllinum, tá Føroyar í 1990 vunnu 1–0 á Eysturríki. Ein annar spælari, sum spældi ta ferðina, var í ferðalagnum hesa ferð, men Allan Simonsen tykist hava gjørt av, at Jákup Mikkelsen skal verja málið, meðan Jens Martin Knudsen skal sita á beinkinum.

Páll Guðlaugsson setti í sínum landsliðsskeiði, sum var til og við 1993, fleiri spælarar við. Leygardagin vóru tríggir á vøllinum: Óli Johannesen, Øssur Hansen og Todi Jónsson. Hinir spælararnir hava bara spælt, meðan Allan Simonsen hevur verið venjari.

Tá Allan Simonsen í 1994 gjørdist venjari, komu Jens Kristian Hansen og Henning Jarnskor á liðið í fyrsta dystinum, sum var ímóti Grikkalandi. Leygardagin var hvørgin teirra við í Lukseburg, og tað var Allan Mørkøre, sum hevur metið í landsdystum, heldur ikki.

Jens Kristian Hansen og Allan Mørkøre eru skaddir. Lítil ivi man vera um, at teir verða við í kappingini um landsliðsplássini, tá teir koma fyri seg aftur. Men tað er hugaligt, at tað ber til hjá landsliðnum at vinna, sjálvt um onkrir av teimum, sum hava verið fastir menn, ikki eru tøkir. Tað boðar frá øktari kapping.

Kristian Høgni er stoltleikin hjá runavíkingum

Mynd: Álvur Haraldssen

Søguligur NSÍ maður

Millum nýggju menninar á landsliðnum er Christian Høgni Jacobsen. Tá tað leygardagin var greitt, at Todi Jónsson ikki fekk spælt, vísti venjarin NSÍ manninum álit heldur enn HB monnunum Andrew av Fløtum og Rógva Jacobsen.

Christian Høgni Jacobsen kom inn í landsdystinum í Svoríki í januar. Tað vil siga, at talan var ikki um debut leygardagin, men tað var merkisvert, at talan var um fyrsta NSÍ mannin í undankappingardysti í seks ár.

NSÍ hevur frammanundan Christian Høgna Jacobsen bara verið umboðað av tveimum spælarum á landsliðnum. Abraham Hansen hevur spælt við NSÍ, men hann hevur ikki umboðað teir í altjóða skrásettum landsdystum.

Jens Martin Knudsen og Djóni Nolsøe Joensen hava tilsaman spælt seytjan landsdystir fyri NSÍ. Merkisvert er tað, at teir báðir, eftir at hava umboðað onnur felog í fleiri ár, nú eru aftur í barndómsfelagnum í Runavík.

Jens Martin Knudsen umboðaði NSÍ í trettan landsdystum fram til og við 1991. Tá var síðsti undankappingardysturin ímóti Jugoslavia í Landskrona 16. oktober.

Djóni N. Joensen hevur umboðað NSÍ í fýra landsdystum. Síðsta ferðin var í vinardystinum ímóti Íslandi í 1995. Síðsti undankappingardysturin hjá Djóna fyri NSÍ var í Russlandi 6. mai í 1995. Ta ferðina loysti Djóni síðstu tjúgu minuttirnar Henning Jarnskor av.

Tað vil við øðrum orðum siga, at tað gingu knøpp seks ár, har NSÍ ongan spælara átti í nøkrum undankappingardysti. Men so mugu vit leggja afturat, at tað var vorðið sum umboð, ið NSÍ fekk í undankappingardystinum ímóti Luksemburg.

Christian Høgni Jacobsen, sum er føddur 12. mai í 1980, gjørdist søguligur, tí hann er fyrsti NSÍ maður, sum hevur skorað á landsliðnum.

Føroyingar hava tilsaman skorað 45 landsliðsmál, og Christian Høgni er seytjandi føroyski málskjúttin. Ein grikki skoraði sjálvmál á Svangaskarði í 1994. Hini málini hava hesir skorað: Todi Jónsson (9), Uni Arge (7), Jan Allan Müller (4), Kurt Mørkøre (3), John Petersen (3), Jens Kristian Hansen (2), Øssur Hansen (2), Henning Jarnskor (2), Torkil Nielsen (2), Jens Erik Rasmussen (2), Kári Reynheim (2), Jan C. Dam (1), Hans Fróði Hansen (1), Óli Johannesen (1), Julian Johnsson (1) og Allan Mørkøre (1).

jh

Føroyar hevjaðu seg millum hinar smátjóðirnar

Millum norðurlendsku grannatjóðirnar tykjast Danmark, Svoríki og kanska Finnland at hava møguleika at koma við í HM endaspælið

Tað gongst betri hjá føroyska landsliðnum í HM undankappingini, enn tað gongst hjá flestu av hinum pinkutjóðunum í Europa. Millum teirra, sum føroyingar plaga at verða sammettir við, eru Liktinstein, San Marino, Malta, Luksemburg, Armenia, Andorra, Kypros, Estland, Moldova, Aserbadjan og kanska eisini Albania, Letland og Litava.

Einastu av hesum londunum, sum hava fleiri stig enn Føroyar í HM undankappingini, eru Estland og Kypros, sum hava seks stig í part. Hesi bæði londini eru í bólki saman, og leygardagin taptu bæði londini stórt á heimavølli. Holland fór úr Andorra við 5–0 sigri, og Írland, sum hevur fleiri ungar og í altjóða høpi nýggjar spælarar, fór av Kypros við 4–0 sigri. Roy Keane, liðformaðurin hjá Manchester United og Írlandi, skoraði tvey mál. Hetta var í bólki tvey.

Í bólki trý hevur Malta eitt stig, men teir hava einki mál skorað. Stórtapið ímóti Danmark leygardagin pyntaði ikki um málmunin, sum nú er 0–9.

Í bólki fýra eru Moldova og Aserbadjan pinkutjóðirnar. Innanhýsis uppgerðin endaði málleyst. Á heimavøllinum fekk Aserbadjan fyrsta stigið, meðan Moldova tvífaldaði sítt stigatal, sjálvt um málmunurin er 0–3.

Armenia er vánaligasta landið í bólki fimm. At teir megnaðu 2–2 á heimavølli ímóti Wales var mett sum gott úrslit og harvið sum vónbrot fyri Wales. Armenia hevur tvey stig og málmunin 5–7.

San Marino spældi ikki leygardagin. Teir eru vánaligasta landið í bólki seks. Letland, sum bara hevur trý stig, legði rygg til 4–1 tap á útivølli ímóti Kroatia.

Í bólki sjey tapti Liktinstein 5–0 í Spania. Liktinstein eru framvegis sørir í stigum, og málmunurin er 0–-7. Í bólki átta fekk Litava fyrsta stigið, tá teir á útivølli greiddu 1–1 ímóti Ungarn. Litava hevur málmunin 2–12.

Albania var um reppið at megna mest óvæntaða úrslitið leygardagin. Tað var ikki fyrrenn í evstu løtu, at týskararnir – sør sjálvum líkum – skoraði 2-1 sigursmálið á heimavølli. Albania hevur trý stig og málmunin 4–4.

Noreg fallið

Av norðurlendsku grannatjóðunum hjá Føroyum er støðan vánaligast í Noregi. Eftir 3–2 tapið á heimavølli móti Póllandi er møguleikin fyri at sleppa til HM í Japan og Suðurkorea næsta ár mest sum burtur. Norsku fjølmiðlarnir eru í øðini. Teir mæla til, at landsliðið verður skift út. Ofta verður farið eftir venjaranumMen í Noregi halda tey ikki, at nakar er betri skikkaður enn Nils Johan Semb at fáa Noreg til EM endaspælið, sum verður í Portugal í 2004. Í staðin verður mælt til, at átta spælarar verða skiftir út. Millum teirra er liðformaðurin Henning Berg.

Svoríki vann tepran, men týdningarmiklan 1–0 sigur á heimavølli móti Makedona. Finnland tapti 2–1 í Liverpool, men finnar høvdu stóran heiður av avrikinum ímóti Onglandi. Týskaland tykiast hava sett seg á oddasessin í bólkinum, meðan Finnland framvegis hevur møguleika í kappingini um næstfremsta plássið. Størsti kappingarneytin hjá teimum er júst Ongland.

Ísland kom á odda í Bulgaria. Hermann Hreiðarsson skoraði í 26. minutti. Tíggju minuttir seinni javnaði Bulgaria, og stutt undan steðginum versnaðu fyritreytirnar hjá Íslandi. Tá varð Larus Sigurðsson rikin av vøllinum. Tólv minuttir undan leikloki fekk heimaliðið sigursmálið.

Danmark vann 5–0 á suðuri á Malta. Men fyri danir hevði leygardagurin verið uppaftur betri, um Ísland hevði megnað at tikið stig frá Bulgaria. Danmark og Bulgaria kappast um plássið aftanfyri Kekkia. Sigarføringin í Danmark er rættuliga høg. Í hvussu so er til í annaðkvøld, tá Danmark skal spæla í Kekkia. Danska pressan heldur, at tað er langt síðani, at teirra lið hevur verið so væl fyri, sum tað er nú. Venjarin, Morten Olsen, sigur, at hann ongantíð hevur sæð trímálaskjúttan á Malta, Ebbe Sand, vera so væl fyri, sum hann er nú.

Russarar hálvsova

Fyri føroyingar var tað leygardagin áhugavert, at Russland og Slovenia spældu 1–1 í Moskva. Tað vil siga, at Russland og Føroyar megnaðu sama úrslit á heimavølli ímóti Slovenia. Dysturin á Svangaskarði ímóti Slovenia í fjør endaði 2–2.

Veðurumstøðurnar í Moskva hesa ársins tíðina hava við sær, at vøllurin á olympiska stadion var ikki serliga góður leygardagin. Avrikið hjá heimaliðnum tóktist heldur ikki serliga sannførandi. Kanska verður eitt sama slag avrik nóg mikið til í morgin at fáa øll stigini ímóti Føroyum, men tað skal nógv meiri til, um russarar skulu hugsa um at sleppa upp í part í endaspælinum um eitt gott ár.

Umframt Russland og Slovenia kappast Sveis og Jugoslavia um pláss í endaspælinum í Japan og Suðurkorea. Innanhýsis dysturin í Beograd ímillum hesi bæði londini endaði leygardagin 1–1.

jh

Neistin–VÍF 22–25 (12–12)

VÍF basti Neistanum

Mansliðið hjá vestmenningum vann tepurt á Neistanum í høllini á Hálsi sunnudagin og sló harvið fast við sjeytumma seymi, at teir eru rættir vinnarar av FM-heitinum

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

Tað var ein góður dagur hjá teimum vestmenningum, sum høvdu leitað sær til Havnar sunnudagin. Fyrst vunnu kvinnurnar á Neistanum, og síðani gjørdu menninir teimum bragdið eftir.

VÍF hevði sum so einki at spæla um annað enn heiðurin, tí meistaraheitið varð tryggjað longu mikudagin, og tað hevur leingi ligið í kortunum, at vestmenningar fóru at ogna sær FM-heitið hjá monnum – og hjá kvinnum.

Fylgdust

Fyrri hálvleikur var sera tættur, og liðini fylgdust væl, sum hálvleikurin leið. Ongantíð vóru fleiri enn trý mál á muni, tá Neistin legði seg framan 7-4.

Munurin var eingin millum liðini bæði, sum spældu væl upp ímóti hvørjum øðrum. Neistamenn tóktust at vera væl uppsettir til dystin, meðan VÍF-ararnir vóru heldur minni tendraðir.

Neistin ansaði væl eftir Inga Olsen mestsum allan dystin, og hann varð mansvardur. Hóast hann var væl ansaður, so skeyt Ingi átta mál í øllum dystinum.

VÍF dró frá

Tað var VÍF, sum vísti betri spæl, tá dysturin varð settur í gongd aftur. Eisini tóktust vestmenningar betri upplagdir eftir steðgin.

Teir drógu spakuliga frá vertunum, sum ikki megnaðu at fylgja við føroyameistarunum. Fyrra part av seinna hálvleiki kom stígur í málskjótingina hjá Neistanum, og teir fingu bara trý mál átjan teir fyrstu minuttirnar. Tað var hesa løtuna, at VÍF legði sjógv ímillum seg og Neistan.

Hjá heimaliðnum var tað serliga Áki Mørk, sum var eyðsýndur í seinna hálvleiki, men hóast hann gjørdi sítt til at fanga VÍF aftur, so eydnaðist tað ikki. Áki gjørdi øll síni fimm mál eftir steðgin.

At VÍF hevur eitt betri lið enn Neistin sást væl við tað, at kanska besti leikarin hjá VÍF, Áki Olsen sat á beinkinum allan dystin, og kom ongantíð inn.

Móti endanum satsaði Neistin alt, teir áttu. Tríggir spælarar fóru út at mansverja VÍF-arar, men hetta gav ikki bonus, tí munurin millum liðini minkaði ikki nakað serligt.

VÍF hevur tryggjað sær meistaraheitið, men tað tykist, sum teir vilja vinna allar dystirnar, teir hava eftir at spæla. Neistin hevur enn ein møguleika at vinna bronsuna, men Kyndil, sum er eitt stig frammanfyri, hevur spælt ein dyst færri.

Neistin hevur tveir torføran dystir eftir at spæla. 1. apríl gongur leiðin inn á Skála, har StÍF tekur ímóti, og seinasti dysturin er ímóti Kyndli.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Neistin: Ári Rouch 6, Áki Mørk 5, Jacob Jónsson 5, Rune Møller 2, Ragnar Zachariasen 1, Kári Mortensen 1, Helgi Justinussen 1
VÍF: Ingi Olsen 8, Sámal Joensen 4, Agnar Joensen 4, John Zachariasen 4, Johnny Joensen 2, Martin Hummeland 2, Rógvi Nielsen 1
Brotskøst: Neistin 5, VÍF 5
Útvísingar: Neistin 5, VÍF 2

Stjørnan sær silvurið

Klaksvíkskvinnur halda fast um næstfremsta plássið í deildini

HONDBÓLTUR
Eyðun Klakstein

Leygardagin var Stjørnan í Havn eftir trimum stigum. Klaksvíkskvinnur spældu ímóti Kyndli, og tað endaði við sigri til Stjørnuna. Úrslitið av dystinum 29-23.

Tá 10 minuttir vóru spældir av dystinum tók Stjørnan seg spakuliga fram um Kyndil, og restina av dystinum var Stjørnan frammanfyri. Munurin var ikki stórur, men Klaksvíkskvinnur høvdu allatíðina frá tveimum og upp í sjey mál á muni.

Hjá heimaliðnum vóru tað næstan bara Lotte Sørensen og Jórun Ludvig, sum skoraðu mál. Tær báðar gjørdu átta mál hvør, og hini málin áttu Jensia Petersen og Ann Hansen.

Hjá Stjørnuni var býtt javnt millum fleiri spælarar. Anna Kristina Samson skoraði 7 mák, og Annika Ljósstein og Simona Dzygute skoraðu seks hvør. Síðani gjørdu fleiri aðrir spælarar færri mál.

Neistin vann í Vágum

HONDBÓLTUR
Eyðun Klakstein

Neistakvinnur hildu fast um møguleikan at vinna heiðursmerki við sigri ímóti Søljuni

Søljukvinnurnar spældu tveir dystir um vikuskiftið. Fríggjakvøldið var Neistin á vitjan, og hesin dysturin endaði við einum vágatapi upp á 8 mál.

Neistin legði grundarlagið undir sigrinum beinanveign í dystinum, tí tá 12 minuttir vóru spældir var støðan 7-1 til Neistan. Tá lá ein rættiligur stórsigur í luftini, men heimaliðið mentist nakað eftir vánaligu byrjanina og fór at gera mál.

Tá liðið fóru til hálvleikssteðgin var støðan 14-8 til Neistan.

Í seinna hálvleiki gekk rímuliga javnt á, men samanlagt togaði Neistin seg tvey mál afturat fram um kvinnur úr Vágum, so at endaliga úrslitið av dystinum gjørdist 24-16

Toppskjúttar hjá liðnum úr Havn vóru Katrin á Neystabø og Annika Thomsen, sum skutu 8 mál í part. Marjun Jørgensen gjørdi seks mál fyri heimaliðið.

Neistin hevur framvegis møguleika at vinna heiðursmerki, og kappingin um metali er ímóti Stjørnuni og VB.